Føroya Banki

# Ársaðalfundur í P/F Føroya Banka 2025

Ársaðalfundurin hjá P/F Føroya Banka verður hildin **hósdagin hin 27. mars 2025 kl. 17.00** í høvuðssæti bankans á Oknarvegi 5 í Tórshavn.

**Fundarskrá:**

1. Frágreiðing nevndarinnar um virksemi bankans í 2024
2. Framløga av ársfrágreiðingini fyri 2024 til góðkenningar, undir hesum ársroknskapur við grannskoðaraátekning
3. Uppskot um nýtslu av avlopi sambært góðkenda ársroknskapi fyri 2024
4. Val av nevnd
    a. Aðalfundurin velur eina nevnd við 4-6 aðalfundarvaldum nevndarlimum
    b. Val av nevndarlimum
5. Val av uttanhýsis grannskoðan
6. Uppskot frá Føroya Landsstýri og uppskot nevndarinnar til viðtøkubroytingar
    a. Uppskot frá Føroya Landsstýri um fráfall av quorum-kravinum sambært § 9.2. í viðtøkum bankans
    b. Uppskot nevndarinnar um broyting av grein 1.1. og 1.2. í viðtøkum bankans
7. Uppskot nevndarinnar um nevndarsamsýningar fyri 2025
8. Ymiskt

**Viðv. punkti 1**
**Frágreiðing nevndarinnar um virksemi bankans í 2024**

Nevndin mælir til, at aðalfundurin tekur frágreiðing nevndarinnar um virksemi bankans í 2024 til eftirtektar.

**Viðv. punkti 2**
**Framløga av ársfrágreiðingini fyri 2024 til góðkenningar, undir hesum ársroknskapur við grannskoðaraátekning**

Nevndin mælir til, at aðalfundurin góðkennir ársfrágreiðing bankans fyri 2024.

**Viðv. punkti 3**
**Uppskot um nýtslu av avlopi sambært góðkenda ársroknskapi fyri 2024**

Ársúrslitið hjá Føroya Banka er sambært góðkenda ársroknskapinum fyri 2024 310,4 mió. kr.

Nevndin mælir til at útgoldnar sum vinningsbýti verða í alt 350 mió. kr., svarandi til 36,46 kr. fyri hvørt partabræv á nominelt 20 kr.

Av hesum stava 133 mió. kr. frá serstakari kapital-tillaging, meðan 217 mió. kr. svara til 70% av ársúrslitinum.

**Viðv. punkti 4**
**Val av nevndarlimum**

a. Sambært § 10, stk. 2 í viðtøkum bankans velur aðalfundurin eina nevnd við 4-6 limum. Aðalfundarvaldir nevndarlimir verða valdir fyri eitt 2 ára tíðarskeið. Tó soleiðis at helmingurin av aðalfundarvaldu nevndarlimunum standa fyri vali hvørt ár.

b. Nevndin mælir til afturval av Tom Ahrenst, Kristian Reinert Davidsen og Marjun Hanusardóttir til nevnd bankans.

**Viðv. punkti 5**
**Val av uttanhýsis grannskoðan**

Nevndin mælir til afturval av PricewaterhouseCoopers Danmark Statsautoriseret Revisionspartnerselskab og Januar, løggilt grannskoðanarvirki P/F sum uttanhýsis grannskoðarar bankans.

**Viðv. punkti 6**
**Uppskot frá Føroya Landsstýri og uppskot nevndarinnar til viðtøkubroytingar**

a. Fráfall av quorum-kravinum sambært § 9.2. í viðtøkum bankans.

Føroya Landsstýri skjýtur upp, at vikið verður frá kravinum um viðtøkuføri sambært grein 9.2 í viðtøkum bankans í sambandi við, at ársaðalfundurin viðger uppskot nevndarinnar 6b.

b. Uppskot nevndarinnar um broyting av grein 1.1. og 1.2. í viðtøkum bankans.

Nevndin skjýtur upp at skifta verandi áseting í grein 1.1. í viðtøkum bankans við hesa:

“Navn bankans er P/F Føroya Banki.”

Nevndin skjýtur upp at skifta verandi áseting í grein 1.2. í viðtøkum bankans við hesa:

“Bankin rekur eisini virksemi undir niðanfyri ásettu hjánøvnum: Bankivik, Norðoya Banki, Sjóvinnubankin, Føroya Bank, Foroya Banki, Foroya Bank, BankNordik, BankNordic, Nordik Bank, Nordik Banki, Nordic Banki, Pensjón Nordik, Pension Nordik, Trygd Nordik, Invest Nordik, NordikInvest og Nordik Íløgur.”

**Viðv. punkti 7**
**Uppskot nevndarinnar um nevndarsamsýningar fyri 2025**

Nevndin mælir til at aðalfundurin viðtekur, at samsýningin til nevnd bankans fyri 2025 verður óbroytt og sum ásett niðanfyri:

| | |
|---|---|
| Grundsamsýning: | 180.000 kr. |
| Nevndarformaður: | 3 x grundsamsýning |
| Næstformaður: | 2 x grundsamsýning |
| Aðrir nevndarlimir | 1 x grundsamsýning |

| | |
|---|---|
| Grannskoðanarnevnd:<br>(Árlig samsýning pr. lim) | 25.000 kr. |
| Risikonevnd:<br>(Árlig samsýning pr. lim) | 25.000 kr. |
| Kredittnevnd:<br>(Árlig samsýning formaður) | 180.000 kr. |

**Bílegging av atgongumerkjum**
Rættur partaeigarans at luttaka á aðalfundi og at atkvøða í sambandi við partabrøv síni verður settur í mun til tey partabrøv, sum partaeigarin eigur skrásetingardagin. Skrásetingardagurin er hósdagin hin 20. mars 2025.

Hvør partaeigari, sum hevur rætt at luttaka á aðalfundi, og sum ynskir at luttaka, skal biðja um atgongumerki. Atgongumerki kunnu bíleggjast á heimasíðu bankans www.bankin.fo, umvegis partaeigaraportalin á www.foroyabanki.com, ella á høvuðsskrivstovu bankans á telefon 330 330.

Í sambandi við tilmelding umvegis partaeigaraportalin, verður elektroniskt atgongumerki sent til ta teldupostadressu, ið partaeigarin hevur skrásett í partaeigaraportalinum.

Partaeigarar skulu hava atgongumerki (talgilt ella prentað) við sær á aðalfundin. Eisini ber til at heinta bíløgd atgongumerki við inngongdina til aðalfundin, um samleikaprógv samstundis verður víst.

Seinasta freist at bíleggja atgongumerki er mánadagin hin 24. mars 2025 kl. 16.00.

Tá atgongumerki verða bíløgd, skal prógv førast fyri, at viðkomandi er partaeigari. Fyri partaeigarar, hvørs partabrøv ikki eru skrásett við navni, verða atgongumerki útgivin, um ein í mesta lagi 5 daga gomul útskrift frá VP Security A/S ella kontuførandi peningastovninum (depotstaðið), verður víst sum skjalprógv fyri partabrævaognina. Við útskriftini skal fylgja skrivlig váttan um, at partabrøvini ikki eru ella verða avhendað øðrum áðrenn skrásetingardagin.

Atkvøðuseðlar verða útflýggjaðir á aðalfundinum.

**Fulltrú**
Partaeigarar, ið ikki kunnu luttaka á aðalfundinum, kunnu geva fulltrú. Á heimasíðu bankans www.bankin.fo, á partaeigaraportali bankans www.foroyabanki.com, umframt á høvuðsskrivstovu bankans er atgongd til eitt fulltrúarskjal, sum kann nýtast í hesum sambandi.

Til ber at geva nevnd bankans fulltrú til at møta og atkvøða tína vegna. Fulltrúin skal vera skrivlig, dagfest og móttikin á høvuðsskrivstovu bankans á Oknarvegi 5, Postboks 3048, FO-110 Tórshavn í seinasta lagi mánadagin hin 24. mars 2025, kl. 16.00.

**Brævatkvøður**
Á heimasíðu bankans www.bankin.fo er atgongd til oyðublað at nýta í sambandi við brævatkvøðu. Um tú vilt greiða brævatkvøðu, skal oyðublaðið vera høvuðsskrivstovu bankans á Oknarvegi 5, Postboks 3048, FO-110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mikudagin hin 26. mars 2025 kl. 16.00.

Eisini ber til at greiða brævatkvøðu umvegis partaeigaraportalin á www.foroyabanki.com í seinasta lagi mikudagin hin 26. mars 2025 kl. 16.00.

**Útgjald av vinningsbýti**
Um aðalfundurin góðkennir uppskot nevndarinnar um rindan av vinningsbýti, verður hetta vinningsbýti væntandi til taks á kontu hjá partaeigarunum týsdagin tann 1. apríl 2025.

**Ársroknskapurin 2024 og fundarskrá við fullfíggjaðum uppskotum**
Ársroknskapurin 2024 við grannskoðaraátekning og ársfrágreiðing umframt fundarskrá við fullfíggjaðum uppskotum fara at liggja frammi á høvuðsskrivstovu bankans og heimasíðu bankans www.foroyabanki.com í seinasta lagi tríggjar vikur áðrenn aðalfundin.

**Avgerðir, partapeningur, atkvøðurættur og kontuførandi peningastovnur**
Á aðalfundinum verða øll mál avgjørd við vanligum atkvøðumeiriluta, sambært § 9, stk. 2 í viðtøkum bankans.

Partapeningur bankans er kr. 192.000.000, býttur sundur í partabrøv upp á kr. 20. Hvørt partabræv á kr. 20 gevur eina atkvøðu á aðalfundinum. Tó eru ávísar atkvøðuavmarkingar galdandi sambært § 8, stk. 3 í viðtøkum bankans.

Í viðtøkum bankans eru hesar ásetingar um atkvøðurætt:

*8.1. Rættur partaeigarans at luttaka á aðalfundi og at atkvøða í sambandi við partabrøv síni, verður ásettur í mun til tey partabrøv, sum partaeigarin eigur skrásetingardagsetingina. Skrásetingardagsetingin er ein vika, áðrenn aðalfundurin verður hildin.*

*8.2. Hvør partaeigari, sum hevur rætt at luttaka á aðalfundi, jvb. § 8. 1, og sum ynskir at luttaka, skal seinast 3 dagar undan aðalfundinum biðja um atgongumerki og atkvøðuseðil til aðalfundin.*

*8.3. Hvørt partabræv gevur eina atkvøðu. Uttan mun til hvussu stóran part ein partaeigari eigur tilsamans av partapeninginum, kann hann fyri egin partabrøv ella sum fulltrúi fyri aðrar partaeigarar, ikki atkvøða fyri meira enn svarandi til 10 % av partapeninginum tilsamans.*
*Ongar avmarkingar eru fyri fulltrúir til nevndina.*

*Uttan mun til hvussu stóran part teir eiga tilsamans av partapeninginum, kunnu partaeigarar innan fyri somu konsern, soleiðis sum hetta hugtak er ásett í lóggávuni, ikki saman atkvøða fyri meira enn svarandi til 10 % av partapeninginum tilsamans.*

*8.4. Partaeigarar hava rætt til sjálvir at luttaka á aðalfundinum, saman við einum ráðgeva ella við fulltrúa, ið kann atkvøða hansara vegna, móti at løgd verður fram skrivlig og dagfest fulltrú, ið er givin fyri eitt tíðarskeið, sum ikki er longri enn eitt ár.*

*9.2. Á aðalfundinum verða øll mál avgjørd við vanligum atkvøðumeiriluta, uttan so at partafelagslógin ella hesar viðtøkur krevja serstakan meiriluta.*

*Uppskot um broytingar av viðtøkum bankans og uppskot um sjálvbodna avtøku og fusión kunnu bert samtykkjast, um uppskotið verður samtykt við í minsta lagi 2/3 av bæði greiddum atkvøðum og tí á aðalfundinum við atkvøðurætti umboðaða partapeninginum og treytað av, at minst 2/3 av partapeninginum er umboðaður á aðalfundinum.*

*9.3 Uppskot frá Føroya Landsstýri um broyting av ella fráfalli av quorum-kravinum í pkt. 9.2 kunnu samtykkjast við í minsta lagi 2/3 av bæði greiddum atkvøðum og tí á aðalfundinum við atkvøðurætti umboðaða partapeningi.*
*Avmarkingar í pkt. 8.3 og pkt. 9.2 viðvíkjandi atkvøðu og fulltrú eru í hesum førum ikki galdandi.*

P/F Føroya Banki hevur gjørt samskipanaravtalu við VP Security A/S. Partaeigarar bankans kunnu velja P/F Føroya Banka sum kontuførandi stovn til at útinna teirra fíggjarligu rættindini gjøgnum.

**Nevndin**

## Annex 1: Board of Directors candidates

Føroya Banki

**Kristian Reinert Davidsen**
Member of the Board of Directors
Born: 1966
Gender: Male
Nationality: Faroese
Candidate for: 2025-26
Independent

**Education**

| | |
|---|---|
| 2002 | HD (Graduate Diploma in organization and management), Copenhagen Business School |
| 1991 | MSc Engineering, E-division, DTU, Denmark |
| 1989 | Academy Engineer, ET-division, DIA, Denmark |

**Directorships and other offices**
For the period 2006-2015 and again since 2024 Kristian Reinert Davidsen has been CEO of Føroya Tele (Faroese Telecom).

For the period 2015-2024 Kristian Reinert Davidsen was CEO at Tusass (TELE Greenland).

Kristian Reinert Davidsen is chairman of the board of LBF (Engineering consultancy).

**Competencies**
Kristian Reinert Davidsen has working experiences and in-depth knowledge of management, strategy processes and project managing.

Furthermore, Kristian Reinert Davidsen has in-depth knowledge of digital transformation and technology security, including security related to personal data and cyber security.

Also, Kristian Reinert Davidsen has a broad knowledge of Greenlandic matters, including the Greenlandic business community and Greenlandic market conditions.

**Tom Ahrenst**
Member of the Board of Directors
Born: 1960
Gender: Male
Nationality: Danish
Candidate for 2025-26
Independent

**Education**
Executive Management program, Columbia Business School
Executive Management program, Wharton Business School
HD-accounting, Copenhagen Business School

**Directorships and other offices**
Tom Ahrenst is self-employed advisor.

Tom Ahrenst is former senior advisor, EVP, at Nykredit.

Since 2006 Tom Ahrenst has been board member at Core Property Management P/S.

For the period 2010-2014 Tom Ahrenst was chairman of the board of Nykredit Leasing A/S as well as chairman of the board of Nykredit Finance plc. for the period 2000-2013.

Furthermore, Tom Ahrenst has been board member at Frankfurter Bodenkredit Gmbh for the period 1998-2000.

**Competencies**
Tom Ahrenst has several years of practical credit-related experiences from Danske Bank and Nykredit, including 25 years as member of the Credit-committee at Nykredit.

With numerous years of working experiences within the financial sector Tom Ahrenst besides management competences also has obtained in-depth knowledge within the credit-area in general. Including financing of mergers and acquisitions, capital market transactions, structuring of company financing, ESG and sustainability issues and management of credit-related risks as a whole.

**<u>Marjun Hanusardóttir</u>**
Member of the Board of Directors
Born: 1954
Gender: Female
Nationality: Faroese
Candidate for 2025-26
Independent

**Education**

| | |
|---|---|
| 1978 | MSc. in Food Science, Royal Veterinary- and Agricultural University, Copenhagen |
| 2003 | Diploma in Public Administration, Danish High School of Public Administration |
| 2006 | MSc. Distinction in Management, Robert Gordon University, Aberdeen |

**Directorships and other offices**
For the period 1996-2021 Marjun Hanusardóttir was Permanent Secretary at The Prime Minister's Office.

From 1987 until 1996 Marjun Hanusardóttir was Executive Director at the Faroese Food and Environmental Agency.

Since 2021 she has been member of the Council of The Danish Foreign Policy Society.

Starting in 2000 and until 2011 Marjun Hanusardóttir was board member of the commercial Fund Nordatlantens Brygge located in Copenhagen, Denmark, while she for the period 1995-1996 was member of an Advisory Council regarding environmental research in the Artic region, referring to the Danish Minister of Environment and Energy.

In the period 1990-1996 Marjun Hanusardóttir was member of Nordic working-group of Fishery-research established under the Nordic Minister Council.

**Competencies**
Marjun Hanusardóttir has several years of practical experiences and in-dept knowledge of Management and Public Administration, being head of the National Administration and counsellor regarding political and public affairs. Furthermore, Marjun Hanusardóttir has been member of various working groups and advisory councils relating to research and environmental issues.